## Gera viðarlund

Bygdarráðið í Porkeri ætlar at gera eina viðarlund í bygdini. Borgarstjórin, Eli Frederiksen, sigur við Vikublaðið, at ætlanin er at gera viðarlundina vesturi í Mýrudalinum, sum er nakað vestan fyri sjálva bygdina. Kommunan hevur fingið tað neyðuga lendið frá Búnaðarstovuni, og í løtuni bíðar kommunan eftir svari úr Innlendismálaráðnum um stuðul til verkætlanina. Gongst sum ætlað, byrjar arbeiðið í summar.

## Vegurin í lagi

Yvirfriðingarnevndin hevur nú góðkent ætlanina at gera vegin til Norðoyatunnilin niðri við sjóvarmálan í Leirvík, soleiðis sum lógin um vegin eisini sigur. Fyrr hevur friðingarnevndin fyri Eysturoy tikið somu avgerð, og Landsverk er farið undir at fyrireika seg til at bjóða arbeiðið út. Spurningurin er so, um málið endar her, tí meirilutin í bygdarráðnum í Leirvík hevur samtykt, at vegurin til Norðoyatunnilin skal gerast oman fyri bygdina.

# Samstarv fremur størri virksemi og økt kappingarføri

**Bedingsmeistarin á Klaksvíkar Sleipistøð heldur, at tað gevur øllum pørtum nakað, tá samstarvað verður. - Vit hava eisini sæð, at skipasmiðjur og fyritøkur, sum eru útbjóðarar av hydraulikki, el og apetering hava staðið saman um størri uppgávur við góðum úrsliti, sigur Óla Hans Johannesen**

HANDVERK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ternan er millum størstu skip, sum kunnu takast upp á Klaksvíkar Sleipistøð. - Skipið skal setast á sigling fyri Teistan, sum er í dokk. Ternan er í góðum standi, sigur bedingsmeistarin, Óla Hans Johannesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Strandfaraskipið Ternan stendur í løtuni á bedingini hjá Klaksvíkar Sleipistøð, sum eisini verður rópt Stórabeding.

Skipið kom upp týsdagin og fór ætlandi av aftur í gjárkvøldið ella í morgun.

Ternan er millum størstu skip, sum teir kunnu taka upp á Stórubeding.

- Vit plaga at siga, at skipini skulu ikki verða størri enn 800-1000 tons, men hetta veldst eisini um tyngd og breidd. Ternan er lutfalsliga breið, og tí kundi hon ikki verið størri, um vit skuldu tikið hana upp á bedingini.

Tað sigur Óla Hans Johannesen, bedingsmeistari á Klaksvíkar Sleipistøð.

### Góðum standi

- Ternan er vaskað og málað, vit hava skift sinkini, og síðan er bildekkið sandblast og málað. Skipið hevur eisini fingið árligt botnsýn, sum Norsk Veritas hevur staðið fyri.

Bedingsmeistarin sigur, at skipið er í góðum standi, og Norski Veritas læt teir vita, at einki sum helst var at finnast at botninum.

- Skipið hevur púrasta rein pappírir, sum Óla Hans Johannesen tekur til.

Sum skilst, skal Ternan, ið annars er standby-skip, setast inn í sigling fyri Teistan, sum skal í dokk og eisini hevur onkrar seruppgávur.

### Øktir møguleikar

- Vit fingu Ternuna at mála, eftirhyggja og til botnsýn í kapping við aðrar, men nú vit hava undirsjóvartunnilin, er einki til hindurs fyri at taka lut í uppgávum, sum aðrar skipasmiðjur hava. Í aðrar mátar kunnu vit eisini koyra kring landið, har brúk er fyri okkum.

Óla Hans sigur, at samstarvið millum Klaksvíkar Sleipistøð og hinar skipasmiðjurnar og bedingarnar er gott, og tað er einki til hindurs fyri at læna fólk og seramboð ímillum, tá brúk er fyri tí.

- Jú, eg haldi, at vit hava eitt sera gott samstarv við aðrar veitarar á økinum, sigur hann.

Bedingsmeistarin heldur eisini, at tað gevur øllum pørtum nakað, tá samstarvað verður uppgávur sum krevja meira enn ein veitara.

- Vit hava eisini sæð, at skipasmiðjur og fyritøkur, sum eru útbjóðarar av hydraulikki, el og apetering hava staðið saman um størri uppgávur við góðum úrsliti.

Hann ivast onga løtu í, at slíkt samstarv ger, at føroyskt handverk eisini stendur sterkari mótvegis útlandinum.

### Ikki klaga

Óla Hans Johannesen sigur, at teir umleið 20 menninir á Klaksvíkar Sleipistøð hava havt rættiliga fitt at gera í longri tíð, og fyri framman eru eisini rímiliga stórar uppgávur.

- Vit skulu eitt nú hava partrolararnar Bak og Stelk til høvuðssýn, har bæði høvuðsmotorar og hjálpimotorar skulu eftirhyggjast, og vit hava eisini onnur skip fyri framman, sum skulu takast upp her hjá okkum, sigur bedingsmeistarin.

Á Klaksvíkar Sleipistøð eru í løtuni 7 lærlingar.



*Seinastu dagarnar hava línuskipini, sum royna undir Føroyum, havt rættiliga smáligan fiskiskap. Millum skipini, sum landaðu á Kósini í gjár, var Jákup B*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Línuskipini draga svart

**Línuskipini, sum fiska undir Føroyum, hava rættiliga smáligan fiskiskap, meðan trolararnir aftur fiska væl**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini, sum seinastu dagarnar hava roynt undir Føroyum, hava lítið og einki fingið.

Jákup B og Ågot landaðu í Klaksvík í gjár, og teir høvdu sløk 40.000 pund í part.

Skipini royndu í umleið eina viku. Ein part av tíðini hevur streymurin verið hálvharðar, og fiskiskapurin hevur verið heldur vánaligur.

Polarstjørnan landaði eisini í Klaksvík mikudagin, og teir høvdu heldur ongan fisk fingið, sløk 20.000 pund.

### Betri trolveiða

Betri hevur gingið hjá trolarunum at fiska.

Safir og Smaragd landaðu í Klaksvík í gjár, og teir vóru mest sum fullir.

Týsdagin vóru Navarin og Borgarin, sum eru fyrrverandi Polarhav og Stjørnan, og eisini teir vóru knappliga fullir.

Mánadagin landaðu Fjallshamar og Nónhamar, fullir undir lúkurnar.

Í gjárkvøldið kom Stjørnan á Klaksvík við 114 kørum sum taka umleið 290 kilo hvørt.

Stjørnan skal takast upp á bedingina hjá Klaksvíkar Sleipistøð.